MÁLTEIGURIN

Úr Orðafari

MARGMIÐIL
Hetta hevur verið í uppskoti at skíra hitt nýggja slagið av teldumiðli, sum á útlendskum hevur fingið heitið »multimedium«, í fleirtali »multimedia«. Føroyska orðið hevur fleirtalssniðið *margmiðlar* (berið saman við t.d. *biðil, biðlar* og *seðil, seðlar*). Hetta er miðil, ið ber hvørt um annað skrivað og mælt mál, tónlist og myndir bæði stillar og kykar. Tílíkur miðil er úrvaldur eitt nú til alfrøði. Tá ið tú hevur lisið eitt nú um føroyskan dans, ber til at síggja hann dansaðan, meðan kvæðini hoyrast kvøðin. Fagri, nýggi heimur, ber til at hugsa! Hetta orðið er ikki at blanda við *fjølmiðil*, ið er felagsheiti á tíðindabløðum, útvarpi og sjónvarpi. Tað er »mass medium« týtt.

SETA ÚT Í KORTIÐ
Summir eru farnir at tala um at »stinga út í kortið« um tað at gera eina ætlan um eitthvørt. Hetta víkur frá gomlum málbróki, tí fyrr hevur altíð verið sagt at *seta út í kortið* um tað at leggja kósina.

»TENGJA«
Hetta er orð, sum er upptikið úr íslendskum í nýggjari tíð, men tað er ikki vorðið lagað at føroyskum ljóðkervi. Orð sum *leingja, heingja, deingja* hava á norrønum (og íslendskum) sniðini *lengja, hengja, dengja*. Hevði norrøna sagnorðinum *tengja* verið óslitið lív lagað inn í nútíðarføroyskt, var sniðið vissuliga **teingja*, tátíð **tongdi*. Hevði orðið verið inntikið av málkønum fólki, hevði tað ivaleyst verið soleiðis tillagað. Man tað vera ov seint at royna at »fríðka« orðið? Ella nýtist okkum tað, tí vit hava orð sum *knýta* og *binda!* Hvussu er og ikki, »tengja« er málinum til lítið prýði og var betur ókomið.

»BEVÍSTUR« > TILVITIN?
Ofta verður spurt, um tað var »bevíst«, at eitthvørt varð gjørt. Eftir vanligum hálvbrotnum máli at døma, kundi ein hugsað sær, at hetta var danskættaða orðið »bevísa«, t.e. *prógva*, í tátíðar lýsingarháti. Men av høpinum skilst, at tað er danska orðið »bevidst« eitt lítið »føroyskað«. Soleiðis verða summi spurd, um tey eru »mótabevíst«. Her hevur fyrr verið roynt at finna hóskandi føroysk orð. Burtur úr máliskuni at *vita til sín* hava verið myndað orð sum *tilvitandi* ella *tilvitaður,* men tey eru kanska í longra lagi og tí ikki nóg »kappingarfør«. Tí var spurningur, um nýgerðin *tilvitin* (formliga viðfyrimynd í orðinum *forvitin)* kundi fingið undirtøku? Hvørkikynssniðið er tá *tilvitið*. Orðið veri so latið áhugaðum til vinaliga umhugsan! Navnorðini *tilvit* og *tilvitska* eru longu til taks.


TAÐ STENDUR Á JØVNUM
Ikki er tað rætt at siga, at »flokkarnir standa á jøvnum«. Heldur eigur tað at vera at *tað stendur á jøvnum* millum flokkarnar (ella: flokkanna millum).

UPPSJÓVARFISKUR
Soleiðis varð skotið upp í seinasta Orðafari at nevna tey fiskasløg, sum á útlendskum verða kallað »pelagisk«, og ikki »uppisjóvarfisk«, ið ljóðað hevur.

KRÁS
Krás er kvennkynsorð. Tað eitur tí ikki t.d. »hetta krásið«, men *henda krásin.*

BLAND
Tað hendir seg stundum, at menn av gáloysni lata orð koma í bland við at taka ein part av einum og annan av øðrum og so seta saman í »nýtt« orð. Veri tað so, at tað verður við ta einu ferðina, men taka teir tað upp aftur í heilum, er komin stund at tala at. Vit hava orðini bæði *útinna* og *avrika.* Burtur úr hesum báðum er so komið orðið »útrika«. Hesum »nýggjyrði« er als eingin tørvur á!

LOK
»valg« > val
»nærmastur« > næstur
»frosturin« > frostið
»álvari« > álvara
»hjørni« > horn
»mýsnum« > músunum
»uttanlanda« > uttanlands, uttanlendis
»tremmur« > rimar
»í inniverandi ári« > í ár
»breið undirtøka« > góð undirtøka
»breiður meiriluti« > stórur meiriluti
»fyristilla sær« > hugsa sær
»yvirbevísa(ndi)« > sannføra(ndi)



© BCB, 1997

KROSSORÐAGÁTA

Vinnari: Hanna J. Nielsen, Gerðisvegur 600 Saltangará

Loysnin frá seinastu viku
Loysnarorðið: RADARSKERMUR

H	A	V	N	A	T	I	N	D	U	R		U	T	A	H
A	K	V	A			O		A	T	E	N		O	R	V
V	R	V		E	A		A	M	A	D	E	U	S		Í
H	A	V	S	B	R	Ú	N			D	I	N	A	N	T
E	B		H	A	V	T	A	S	K	A		I	R	I	S
S	O	R	A	N	A	R	I	N			T		I	K	E
T	R	I	N		R	Ó	S	U	R	N	A	R		K	R
U	G	G	A	R		Đ		P	I	S	U	R		A	K
R		A		E	Í	R	A	S	T			R	A	J	U
99	A				B	A				D	D	R		A	R
H	V	Í	T	A	B	R	Ú	G	V		E		K	R	
E	F	F	I	E		B	R			A	N	D	A	Đ	I
R	A		M	G		Á	V	Ø	K	S	T	U	R	I	N
D	K		I		A	T	A	J	Ó	L	U	R		R	A
I	S	T	A	N	B	U	L		K	A	R	J	N		R
S	A	N	N	I		R	I	V	A			N	Á	T	I

© BCB, 97

Hvønn leygardag
verður krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein av niðanfyri nevndu bókum frá Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysnarorðið vera okkum í hendi *í seinasta lagi hósdagin.* Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysnarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ____«** á bjálvan.

Loysnarorð: 100

Navn

Bústaður

Bygd/býur

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

- ❑ **Fuglar í Norðurhøvum**
- ❑ **Stjórnarskipanarmálið 1946**
- ❑ **Spell at sólin kom upp**
- ❑ **Politiska søga Føroya 1814–1906**
- ❑ **Føroyskir soppar**
- ❑ **Døgurðabókin**
- ❑ **Søgan um eplið**
- ❑ **Heimsatlas**
- ❑ **Mannakroppurin – og hvussu hann starvar**
- ❑ **Alfagurt ljóðar mín tunga (fløga/ljóðband)**

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt.

FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNUR